# Ægir skal søkkjast



**Klaksvík:** Ægir liggur á Klaksvíkar Sleipistøð, har tað verður arbeitt við at taka motorin og annað úr honum, áðrenn hann verður søktur.

Tað var á heysti í fjør, at Ægir rendi á land á Glyvursnesi, og bleiv vrak. Hann hevur ligið í Havn síðani, inntil hann hósdagin kom norður til Klaksvíkar.

Føroya Ferðaleiðarafelag:

# Út á Tinganes við ferðaleiðara



FERÐING
*Tíðindaskriv*

Í sambandi við altjóða ferðaleiðaradagin skipar Føroya Ferðaleiðarafelag fyri nøkrum ókeypis tiltøkum til at gera einstaklingar og fyritøkur var við sítt yrki.

Hósdagin verða møguleikar hjá einstaklingum og umboðum fyri fyritøkur at fara rundtúr við ferðaleiðara á Tinganesi. Ætlanin er at fara 3 túrar: Kl. 10.00, kl. 15.00 og kl. 20.00. Byrjað verður við Gl. Bókahandil í miðbýnum.

Tey allarflestu útlendsku vitjandi fara ein túr á Tinganes, men hava øll Havnafólk verið runt á Tinganesi við ferðaleiðara? Og fólk av bygd? Hetta er eitt upplagt høvi fyri føroyingar at vitja á hesum søguliga stað og fáa frágreiðing um ymsu húsini og hendingar, ið hoyra elsta býarpartinum til. Tinganes og Reynið vóru Barbaru'sa verð, og nógvar av søgunum hjá Williami Heinesen ganga eisini fyri seg á Tinganesi.

Leggið til merkis, at tiltakið er ókeypis. Um fyritøkur og einstaklingar kortini ynskja at stuðla felagnum, ber til at rinda eitt súmbolsk gjald fyri túrin, sum fer óskert til felagið, sigur nevndin í Føroya Ferðaleiðararfelag í tíðindaskrivi.

# LRC-skeið á Klaksvíkar Sjómansskúla



*Luttakarar á radioskeiðinum á Klaksvíkar sjómansskúla: Don Petersen, samskipari á Fjarskiftiseftirlitinum, Pole Mikkelsen, stjóri, Óla Hans Jóhannesen, Klaksvík, Fríðrik Sivertsen, Viðareiði, William West, Klaksvík, Sólarn Isaksen, Húsar, Finn Baldvinson, Klaksvík, Regin Askham, Norðoyri og Erland Frederiksberg, Klaksvík*

RADIOSKEIÐ

Mikudagin varð radioroyndin LRC (long range certificate) hildin á Klaksvíkar Sjómansskúla. Hetta er fyrstu ferð, at hendan radioroyndin er hildin í Føroyum.

Krøvini til skipini um radioútbúna eru økt, og tí eru tey gomlu VHF-prógvini ikki nøktandi longur. Skip skulu í framtíðini umframt tann vanliga VHFin eisini hava digitala VHF útgerð (DSC), og tí er nú neyðugt við størri prógvi, og tað hava teir á Klaksvíkar Sjómansskúla tikið til eftirtektar og hava bjóðað fram skeið í LRC.

LRC-prógvið nøktar tørvin hjá fiskiskipum, ið eru oman fyri 24 metrar í longd, sum eisini fiska ella sigla í A2 øki. A2 økið er øki, ið er uttan fyri har sum VHFurin kann nýtast til samskifti við land.

Hetta skeiðið, ið nú er lokið, var hildið um kvøldarnar, men í framtíðini verða tey hildin um dagin, so at tey taka minni tíð. Ætlanin er, at næsta skeið skal byrja hin 25. februar og próvtøkan verður so hildin fríggjadagin í somu viku.

Klaksvíkar Sjómansskúli hevur fingið nógvar fyrispurningar um hetta skeiðið, og um fólk hava hug at tekna seg til tað er bara at ringja til sjómanskúlan á telefon 456128.

# Fyrsta kappingin í Ársins Songrødd verður leygarkvøldið

**Leygarkvøldið 23. februar verður fyrsta innleiðandi umfar í Ársins Songrødd 2002 fyri Havnina**

SANGKAPPING
*Tíðindaskriv*



*Navnframi James Olsen, sum eisini er kendur í samband við danska "poppikonið" Erann DD, verður frásøgumaður*

Av tí at ovurstórur áhugi er at lutaka í høvuðstaðnum verða tvey umfør. Tað seinna umfarið verður leygarkvøldið 27. apríl.

Sum heild hava sera nógv teknað seg til kappingina. Saman við stuðlunum, Føroya Banka, Føroya Bjór og Casablanca verður meira gjørt burturúr í ár enn undanfarnu árini. M. a. verður umframt 1. vinning eisini latið 2. og 3. vinningur.

Vinnarin av Ársins Songrødd fær 10.000 krónur. Nr. 2 fær 5.000 krónur, og triði vinningur er 2.000 krónur.

Navnframi James Olsen, sum eisini er kendur í samband við Danska "poppikonið" Erann DD, verður frásøgumaður. Og sum prikkurin yvir i'num fer ein av okkara bestu DJ'arum, Martin Kjærbo, at standa fyri undirhaldinum sum verður aftan á kappingina. Har koma vit m. a. at hoyra James Olsen syngja, eisini fáa áskoðarar høvi at lutaka í ymsum kappingum, og verða gávulutir frá Føroyar Banka og Føroya Bjór tveittir út millum áskoðararnar.

Vinnarnir av innleiðandi umfarinum fáa gávukort frá Casablanca. Nr.1 og nr.2 koma víðari til finaluna, sum verður í Badmintonhøllini í Havn tann 29. juni.

Fyrireikararnir vóna, at tiltakið kann geva luttakarunum eitt innlit í, hvussu tað kennist at verða á palli, har ein stór áskoðarafjøld og yrkisligar fyritreytir so sum ljóð og ljós eru til staðar.

Samstundis vóna fyrireikararnir, at tiltakið eisini kann lata upp hurðar fyri luttakarar inn á almennan tónleika- og songpall, eins og tað kanska hevur gjørt fyri eitt nú Eivør Pállsdóttir, Arnfríð Lutzen, Guðrun Jacobsen, Kaj Johannesen, James Olsen, Malan Eyðunsdóttir og mong onnur.

Tey hava øll luttikið í Ársins Songrødd.



# Eivør hevur tað gott



**- Ein orsøk til mína strongd var óivað, at tónleikarar í Føroyum nærum ongan pening fáa fyri teirra framførslur, og av somu orsøk noyðast at arbeiða alt ov nógv**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Orðini eigur Eivør Pállsdóttir; sangfuglurin, ið flýgur hægst í Føroyum.

Í løtuni er hon tó stødd í Íslandi, har hon arbeiðir við eyðkendu røddini, sum flest allir føringar kenna so væl.

### Á sangskúla

Eivør hevur nú verið í Íslandi í góðar 6 vikur. Tíðina hevur hon nýtt til at lært seg meira um, hvat røddin er, og eisini hvussu kroppurin verður nýttur, tá sungið verður.

- Eg eri á einum sangskúla tveir dagar um vikuna, har eg læri eitt sindur um nótalestur, fái gittar- og klaverundirvísing og so sjálvandi eisini sangundirvísing. Harafturat gangi eg eisini til onkran taluserfrøðing og lækna. Teir læra meg, hvat røddin er, hvussu hon sær út og hvussu eg sjálv brúki mína rødd.

Men ein nýtir jú ikki bara røddina, tá ein syngur. Allur kroppurin verður nýttur, so eg fái undirvísing í yoga og øðrum fimleiki, soleiðis at eg verði betri til at nýta kroppin eisini, greiðir Eivør frá.

### Eitt upplivilsi

Tað var Oløs Kolbrún Hardardóttir, ið fekk Eivør at koma við sær til Íslands. Oløs hevur verið í Føroyum nakrar ferðir í sambandi við sangskúlan her heima, og hon legði skjótt til merkis, at røddin hjá Eivør ljóðaði strongd.

- Eg hevði eisini havt alt ov nógv at gjørt í langa tíð. Eg hevði framførslur hvørt vikuskifti í meir enn eitt ár, og sjálvandi merkist hetta á røddini. Røddin er jú mítt instrument, og tá eg ikki dugdi nóg væl at nýta hana, so merkist tað eisini í endanum, sigur Eivør.

- Eg síggi uppihaldið hjá mær her í Íslandi sum eitt stórt upplivilsi. Eg havi lært ótrúliga nógv, og longu nú hevur røddin tað betri. Og sjálvt um tað er øgiliga hart at sita her, tá eg heldur vil vera í Føroyum og spæla og syngja, so komi eg ikki heim enn. Eg vil læra meir um mína rødd áðrenn, greiðir sangfuglurin frá.

### Heim at vitja

Tann 1. mars kemur Eivør tó til Føroyar aftur, men bert í eina stutta tíð. Hon skal avstað aftur longu eina viku eftir, men sigur seg gleða seg til at síggja øll aftur, um bert í eina stutta tíð.

- Eg leingist so øgiliga illa eftir øllum teimum, ið eg eri góð við, sigur hon.

- Eisini teimum í Clickhaze. Eg gleði meg til at sleppa at spæla saman við teimum aftur. Sum er bíða teir bara fittir við tolni.

Enn veit hon tó ikki, nær hon av álvara kemur heim aftur.

- Um ein skal vera tónleikari alt lívið, so krevur tað ótrúliga nógv arbeiði og nógva tíð. Og tíðin í Íslandi er bert eitt stig á leiðini hjá mær til at gerast ein betri tónleikari, sigur Eivør at enda úr Íslandi.

# Føroyingar fremstir í DM í tipping



*Kristian Joensen, ein av ágrýtnu tippararnum í Føroyum*

**Nú er bert eitt umfar eftir í kappingini um Evropa rundferðina hjá Dansk Tipstjeneste, og Finnur Helmsdal og Kristian Joensen liggja á odda.**

TIPPING
*Solby A. Eliasen*

Komandi vikuskifti fellur avgerðin um, hvørji sleppa á eina Evroparundferð til Týskland, Italia og Onglands at hyggja eftir fótbólti á hægsta stigi. Hetta vikuskifti hevur fyrra lokalfinalan av tveimum verið. Og vunnu Finnur og Kristian sínar.

Komandi vikuskifti verður tann seinna og vinna teir eisini tá, so hava báðir møguleika til at fara á Evroparundferð.

Kappingin er skipað soleiðis, at tað eru lokalfinalur allastaðni runt í ríkinum. Kappast verður í tveimum vikuskiftum, og vinnararnir sleppa við á rundferðina. Tað verða sostatt eini 50 fótbóltsglað fólk, sum fara avstað.

### Kristian "Ugens gæstetipper"

Klaksvíkingurin Kristian Joensen vann heiðurliga tittulin hjá Dansk Tipstjeneste "Ugens gæstetipper". Hann kundi vinna ein túr niður á Anfield Road at hyggja eftir Liverpool, men ferðin var bert úr Esbjerg og aftur, so hann tók ikki av. Hann vinnur í staðin eina Adidas-drakt.

- Sjálvandi eri eg eitt sindur skuffaður av hesum, men tað verður harvið, sigur Kristian Joensen.